# Sjáldsamur og søguligur sangur

**Gjógvin í Elduvík var full av sangi og fólkum mikukvøldið. Hjúnini Brattaberg sungu og hugtóku á forkunnugari konsert, har 300 fólk vóru komin at lýða á**

KONSERT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Sjáldan hava so nógv fólk savnast í gjónni í Elduvík, sum tað vóru mikukvøldið, tá hjúnini Brattaberg, Susanne og Rúni, sungu har. Eini 300 mundu tey vera, sum vóru komin at lýða á sang og var gjógvin millum klokkan sjey og átta í gjárkvøldið stúgvandi full av fólki og sangi.

Løtan byrjaði við felagssangi, og fleiri hundrað raddir tóku væl undir við »Nú nemur náttin við smærur«.

Síðani tóku tey bæði Rúni og Susanne yvir, og við fylgispæli frá Cristopher Arpin sungu tey fýra verk hvør. Talan var um verk eftir Jules Massenet, Mozart, Georges Bizet, Richard Wagner, Giuseppe Verdi og Otto Nicolai.

Blandingin av djúpum og høgum tónum skaptu saman við gjónni og teim mongu áhoyrarunum eina minniliga og søguliga løtu, tí neyvan hava so mong fólk verið savnað í gjónni í Elduvík.

Síðani sluppu áhoyrararnir aftur at syngja, og hesaferð var tað »Einki er sum summarkvøld við strendur«, sum var felagssangurin.

Tiltakið vardi ein tíma og endaði við, at øll fingu sær súpan , og meðan sopið varð, minkaði mannamúgvan í gjónni spakuliga.



*300 fólk vóru í gjónni í Elduvík í lýddu á meðan Rúni og Susanne Brattaberg sungu*

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum



## Redaktiónsleiðari

### - Vilt tú mynda dagsskránna í Føroyum?

Á Sosialinum sóknast vit eftir einum redaktiónsleiðara, sum skal hjálpa blaðstjóranum í tilrættislegging og framleiðslu av tíðindapartinum av Sosialinum.

Sum redaktiónsleiðari verður tú við til at seta dagsskránna í føroyska tíðindaheiminum, har Sosialurin og Miðlahúsið í dag fevna um ein týðandi part av tíðindastreyminum, har vit gjøgnum fleiri miðlapallar eru við til at mynda føroyska samfelagið.

Vit sóknast eftir einum persóni við royndum innan yrkið, sum hevur gott yvirblikk, og sum eisini dugir at planleggja gerandisdagin - tó at nógvir óvæntaðir lutir altíð kunnu stinga seg upp á eini rokmiklari redaktión. Coaching og evaluering av blaðfólkum og arbeiði teirra er eisini týðandi partur av starvinum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella royndir innan tíðindaheimin.

Eitt grafiskt eyga og evni at seta upp tíðindasíðurnar sjálv/ur er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Løn sambært avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo.

Áhugaðir umsøkjarar skulu **innan 20. august** senda umsókn og viðkomandi upplýsingar til:
Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Umsóknir kunnu sjálvandi eisini sendast við telduposti til jan@sosialurin.fo

*Sosialurin er ein fyritøka í støðugari menning. Hvønn gerandisdag eru vit á gøtuni við hópin av tíðindum. Blaðið er eisini at finna á alnetinum, har vit eisini røkja tíðindaflutningin á portal.fo, planet.fo og sportal.fo. Á Sosialinum starvast í dag um 25 starvsfólk.*



*Birita Christiansen fann hepna Sudoko vinnaran í rúgvuni.*

# Hepni Sudoko vinnarin funnin

Á middegi í dag hevur Sosialurin funnið ein hepnan Sudoku vinnara. Vinnarin varð Hanna Joensen úr Signabø. Hon hevur ognað sær heili fýra atgongumerki til Summarfestivalin – tvey til vaksin og tvey til børn. Somuleiðis fær Hanna eitt gávukort á 1000 krónur. Summarfestivalurin byrjar sum flestum kunnugt í dag, so tað er bara at skunda sær eftir atgongumerkjunum.